## Kaká til Madrid



Eftir øllum at døma spælir brasilski Kaká í Real Madrid komandi kappingarár. AC Milan hevur støðugt sagt, at teir ikki vilja selja 28 ára gamla brasiliumannin, men sambært blaðnum, Marca, hevur Kaká longu verið til læknakanningar, soleiðis at sáttmálin nú kann undirskrivast. Sum skilst er prísurin, sum Real Madrid skal rinda, á leið 484 milliónir krónur.

## Ferrara skal venja Juventus

Juventus hevur nú gjørt avtalu við fyrrverandi stórspælaran hjá felagnum, Ciro Ferrara, sum skal virka sum venjari tey bæði komandi árini. Ferrara stóð á odda fyri Juventus teir báðar seinastu dystirnar í fjør, og við tveimum sigrum í hesum stóð hann í øllum førum fyrstu royndina. Ferrara spældi í Juventus frá 1994 til 2005, og var millum annað við til at finna fimm meistarheiti og Champions League.



*Rumenska spælið var til tíðir ein sonn fragd at síggja. Ikki minst var lágvaksni Andrei Gabriel Torje ein støðug hóttan fyri føroyska liðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Føroyar-Rumenia 0-4 (0-2):

# Mistøkini kostaðu dýrt

**Rumenia var nakrar styrkisflokkar oman fyri Føroyar, men tað var harmiligt at síggja, hvussu fimm persónlig mistøk í roynd og veru kostaðu dystin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Royndir eru nakað, sum ein fótbóltsspælari bert fær við at spæla dystir. Og í so máta vóru føroysku U21-spælararnir eina stóra roynd ríkari, tá teir fóru av vøllinum eftir 4-0 tapið móti Rumenia leygardagin.

Týdningarmesta royndin av øllum var hesaferð ævigi sannleikin um, at á toppstøði verða persónligu mistøkini revsað uttan stórvegis náði.

### Málini og útvísingin

Ofta verður tikið til, at so at siga øll mál í fótbólti eru úrslit av villum hjá mótstøðuliðnum. Nú skulu vit ikki seta prosentir á, hvussu neyvur hesin sannleikin er, soleiðis generelt. Men leygarkvøldið var sannleiksvirðið í útsøgnini í øllum førum um tey 100 prosentini.

Fyrsta rumenska málið var kanska ein perla, tá Rusescu høgdi bóltin uppí samankomingina úr 25 metrum. Men mistakið var, at sami Rusescu mest sum ótarnaður slapp at trekkja inn í vøllin og leggja sær bóltin til rættis, áðrenn hann varð tackladur av Frank Poulsen, sum ikki var heilt á tærnum.

Tað var Dánjal Davidsen heldur ikki, tá Rumenia økti til 2-0. Rumenar høvdu longu upp til fleiri ferðir víst klassiska spælistílin, har smáspæl í einum borði endaði við diagonalskifti út á kantin. Hesa ferð varð frí-